ítróttur

Nr. 225 • mikudagur • 24. november 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

Neistin vil byggja fyri 18 mió kr.

Limir felagsins skulu á eykaaðalfundi sunnudagin taka støðu til, um felagið skal fara undir risaíløguna, sum kann gerast ein sonn kollvelting fyri venjingar- og dystarumstøðurnar hjá felagnum

HONDBÓLTSHØLL
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo



Her er ætlanin, at Neistin skal byggja nýggju høllina

Tað hevur leingi verið alment kent, at fólk í Neistanum ígjøgnum longri tíð hava arbeitt við ætlanunum um, at felagið skal byggja sína egnu høll.

Eitt nú var komið heilt væl áleiðis arbeiðinum at gera eina høll við Læraraskúlan, men hendan ætlanin kollsigldi, tí tað vísti seg at vera ógjørligt hjá felagnum at sannføra umsitingina á Vaglinum um, at júst hetta var rætta staðið at byggja eina slíka høll.

Ístaðin varð tá skotið upp, at Neistin saman við Ljósinum skuldi byggja eina dupulthøll úti við Tekniska Skúla, men tann ætlanin vísti seg skjótt at gerast alt ov kostnaðarmikil, og varð tí slept.

Síðani eru menn tó komnir eftir, at eitt økið nær SEV-bygninginum við Landavegin var lagt av til ítróttarendamál. Tosað hevur verið við Býráðið um hetta, og nú hava so bæði Tekniska nevnd og Fíggjarnevndin mælt til, at stuðla ætlanini.

Ein av orsøkunum til, at talan verður um eina høll í Vesturbýnum, er, at tað her tykist vera lættari hjá felagnum at fáa raksturin av høllini at bera seg. Sum skilst, so er tað ikki sjálv iløgan í høllina, sum gav figgjarligt høvuðbrýggj, men heldur dagligi raksturin. Skal hesin bera til, er neyðugt, at høllin verður leigað út um fyrrapartin, tá Neistin ikki nýtir hana. Tann møguleikan meta tey í Neistanum vera størri í Vesturbýnum, har at kalla eingir ítróttarhentleikar eru. Og sum støðan við hallartímum er í høvuðsstaðnum í dag, so verður tað helst ikki undir nøkrum umstøðum nakar trupulleiki at leiga høllina út.

Ognarfelag

Tað verður tó ikki Neistin sjálvt, sum kemur at standa sum eigari av høllini. Ætlandi skal eitt nýtt ognarfelag setast á stovn. Nakað sum tað, ið er kent frá Gundadalshøllini, har íognararnir eru Neistin, Fleyr og Kyndil.

Her verður mynstrið á leið tað sama, tó at Neistin verður einasti eigarin. Tað vil siga, at av teimum 18 milliónunum, sum krevjast til byggingina, skal Neistin – ella í hesum førinum stuðlafelagið - skal gjalda 6 mió kr. 6 milliónir verða so goldnar av Býráðnum, sum vanliga letur triðingin í figging.

Tað sama var áður galdandi fyri landið, men tann parturin av figgjarlógini er nú broyttur. Ístaðin verður tosað um eitt nýtt modell, har eitt slag av partaeigarum koma at seta seinasta triðingin í ætlanina.

Allar hentleikar

Og stendur tað til Neistan, so verður talan um eina høll við alskyns hentleikum.

Einir 800 áskoðarar skulu rúmast í høllini. Hon skal hava fýra skiftirúm, só eisini tann fløskuhálsurin fæst burtur. Vektrúm, høli til fyrisiting, fundarrúm og kantina eru eisini við á tekniborðinum.

At kostnaðurin so kortini kann haldast niðri á 18 mió kr., kemst fyrst og fremst av, at tað verður roknað við einum hampuliga stórum parti av sjálvbodnari arbeiðsmegi.

Og einki er at ivast í, at limirnir í Neistanum eisini koma at fáa nakað aftur fyri arbeiðsmegina, um tað kemur hartil, at høllin skal byggjast. Verður roknað í lutfalli millum íðkandi limir og venjingartímar, so eru Neistin og Kyndil helst tey hondbóltsfeløgini, sum hava truplastu umstøðurnar at virka undir, og onkra tíð hava tey eisini verið noydd at nokta fyri upptøku av nýggjum limum.

Her hevur felagið so møguleikan at fáa føtur undir egið borð, og tó at tað helst vigar ímóti, at felagið tá kanska noyðist úr Gundadali, sum annars hevur verið heimið síðani stovnanina í 1932. Gaman í kemur felagið enn at eiga triðingin í Gundadalshøllini, so nakað av aktiviteti verður eisini har. Men tað er helst lítið at ivast í, at í talan við tíðini gerst um eina flyting yvir í Vesturbýin hjá felagnum.

Hvat av hesum vigar meira, skulu limir felagsins altso taka støðu til á eykaaðalfundinum, sum verður sunnudagin.

Boccia-kapping

BOCCIA
tíðindaskriv

Leygardagin skipaði ÍSB fyri heystkapping í boccia. Henda kappingin var á Hálsi og byrjaði kl. 9.30. Byrjað varð við innleiðandi kappingum í bólikinum fyri menningartarnað, síðan varð farið undir kappingarnar hjá rørslutarnaðum vaksnum og barnakappingina. Semifinalur og finalur vórðu spældar, og hesi vóru vinnararnir:

Menningartarnað:
1 Mýrá, Vágur
2 Øssur Gudmundsson, Havn
3 Jørgin av Vollanum, Havn

Rørslutarnað vaksin:
1 Jógvan Telling Joensen
2 Marius Johansen
3 Jói Ziska
Allir úr Havn

Børn:
1 Martin Kristoffur Kristiansen, Eiði
2 Dánjal Jákup Djurhuus, Strendur
2 'Junior' Tomlinson, Eiði

Systkin:
John Haraldsen vann bólkin, tó uttan dyst tí bert hann hevði meldað seg til

Tá hesar kappingarnar vóru av, og heiðursmerkini vóru handað av Jógvan Elias á Løgmansbø, umboð fyri Javna, varð farið undir kappingina fyri pensionistar. Hesa ferð spældu tey einstaklinga kapping, og sær úrslitið soleiðis út:

1 Jørgen Dahl, Havn
2 Jenny Danielsen, Havn
3 Karl Simonsen, Havn

Stórkappingin 2004

Árliga stórkappingin í svimjing verður um vikuskiftið hildin í Klaksvík og Leirvík

SVIMJING
tíðindaskriv

Stórkappingin í svimjing verður hildin um vikuskiftið

Luttøkan verður stór, ialt 150 svimjarar úr øllum landinum, og er hetta kappingin hesumegin jól ið svimjararnir hava sæð fram til, so roknast kann við eini sera spennandi kapping.

Svimjararnir koma úr Tvøroyrar Svimjifelag, Vágs Svimjifelag, Havnar Svimjifelag, Flot, Skeggjar, Reki, Fuglafjarðar Svimjifelag og Ægir.

Henda kapping er býtt øðrvísi upp enn vit vanliga gera í Føroyum, kappingin er býtt upp eftir norðurlendskum høpi, hesir aldursbólkar kunnu luttaka:

Kvinnur: Bólk 2 árg 93-95, Bólk 1 árg 91-92, Junior árg 89-90, Senior árg 88 og eldri.

Menn: Bólk 2 árg 91-93, Bólk 1 árg 89-90, Junior árg 87-88, Senior árg 86 og eldri.

Tað verða 46 kappingar svomnar í hvørjum bólki, so hetta er ein nógv størri kapping enn vit eru von við í Føroyum, ialt verða 1400 startir.

Kappingin byrjar kl. 16 fríggjadagin í Klaksvík, har allir 150 svimjararnir koma at kappast.

Leygardagin veðrr kappast í Leirvík og Klaksvík fyrra part, og síðan koma øll tey ið kvalisera seg í finalurnar at kappast í Klaksvík seinnapartin.

Í finalurnar koma seks tey bestu úr hvørjari kapping í teim styttru teinunum frá fyrrapartinum.

Leygar- og sunnumorgunin byrja kappingarnar kl. 08:30 og svomið verður út móti middegi.

Finalurnar leygardagin byrja Kl. 16 í Klaksvík, og sunnudagin verður byrja kl. 15 í Klaksvík.

Í øllum kappingunum verða heiðursmerkir latin til svimjararnar ið blíva nr. 1-2-3

ÍSB-svimjikapping

SVIMJING
tíðindaskriv

Leygardagin skipaði ÍSB fyri svimjikapping í Eystursklúlanum.

Allir luttakararnir svumu tvær ferðir ella meira. Tíggju ymiskar kappingar vóru at velja í, so hvør luttakari fekk roynt seg í hóskandi styrki.

Kappast varð í 200 m Crawl, 17 m frí, 100 m Crawl, 50 m bringu, 200 m Blandað, 34 m frí, 200 m bringu, 50 m rygg, 17 m rygg, 50 m Crawl.

Allir luttakararnir fingu heiðursmerki til minnis um luttøkuna í hesi heyst svimjikapping

Einstøku úrslitini vóru hesi

1. 200m crawl
1 Halla Poulsen 3.56,09

2. 17 m frítt
1 Hans J. Bárá 30.25,00
2 Súsanna Johannesen 0.28,69
3 Tórur í Puntabyrgi 0.38,66

3. 100 m Crawl
1 Símun P. Zachariassen 1.23,18
2 Rannvá Strøm 31.23,84
3 Halla Poulsen 31.47,38

4. 50 m Bringu
1 Júst í Túni 0.49,63
2 Marjun Niklasardóttir 1.05,53
3 Beint Sørensen 31.10,31

5. 200 m Blandað
Heat 1
1 Rannvá Strøm 33.49,81

6. 34 m Frítt
Heat 1
1 John Joensen 30.27,78
2 Magnus V. Olsen 30.28,28
3 Elvin Weihe 30.31,19

Heat 2
1 Eydis á Løgmansbø 0.32,06
2 Beint Sørensen 30.42,19
3 Marjun Niklasardóttir 0.43,62

7. 200 m Bringa
1 Júst í Túni 34.02,94

8. 50 m Rygg
Heat 1
1 Rannvá Strøm 30.47,94
2 Halla Poulsen 31.00,06

Heat 2
1 Símun P. Zachariassen 0.46,31
2 Júst í Túni 30.47,57

9. 17 m Rygg
1 Hans J. Bárá 30.25,28
2 Súsanna Johannesen 0.28,25
3 Tórur í Puntabyrgi 30.39,57

10 50 m Crawl
Heat 1
1 Símun P. Zachariassen 0.38,59
2 Rannvá Strøm 30.39,44
3 Júst í Túni 30.40,06

Heat 2
1 Magnsus V. Olsen 30.44,88
2 John Joensen 30.45,28
3 Elvin Weihe 30.50,16

Heat 3
1 Halla Poulsen 30.50,41
2 Eydis á Løgmansbø 0.52,00
3 Beinta Sørensen 31.13,81

Hondbóltsstøður

SUNSET KAPPINGIN

KVINNUR

	dystir	v	-	j	-	t	v. mál	t. mál	mál-mun.	stig
1 VB	7	6	-	0	-	1	214	142	72	12
2 Neistin	7	5	-	0	-	2	212	158	54	10
3 Stjørnan	5	5	-	0	-	0	138	104	34	10
4 Søljan	7	4	-	0	-	3	204	173	31	8
5 VÍF	7	3	-	0	-	4	162	175	-13	6
6 StÍF	7	1	-	1	-	5	150	186	-36	3
7 Kyndil	5	0	-	1	-	4	92	146	-54	1
8 Tjaldur	5	0	-	0	-	5	98	186	-88	0

ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN

MENN

	dystir	v	-	j	-	t	v. mál	t. mál	mál-mun.	stig
1 VÍF	7	6	-	0	-	1	200	172	28	12
2 Kyndil	6	4	-	0	-	2	179	145	34	8
3 H71	7	4	-	0	-	3	216	201	15	8
4 KÍF	7	3	-	0	-	4	179	204	-25	6
5 Neistin	6	2	-	0	-	4	174	178	-4	4
6 StÍF	7	1	-	0	-	6	182	230	-48	2

Orsakað, Neistin

Í uppgerðini av støðunum í bestu hondbóltsdeildunum í týsdagsútgávu okkara var tíverri eitt lítið mistak komið í.

Her var úrslitið av dystinum millum Neistan og Søljuna í Sunset kappingini av misgávum dottið burturímillum, og hevði Neistin tí tvey stig færri á okkara uppgerð, enn liðið í veruleikanum hevur.

Vit biðja Neistan og lesararnar um at halda okkum til góðar, og prenta her røttu stigatalvurnar.

-jm

Skerdir neistamenn í eldin

Mansliðini hjá Kyndli og Neistanum skulu dystast mikukvøldið. Somuleiðis skal kvinnuliðið hjá Kyndli royna seg móti Tjaldri

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Einki er at ivast í, at spenningurin er stórur undan seinnu grannauppgerðini millum havnarliðini. Kyndil hevur í longum løtum av kappingarárinum verið flúgvandi, og millum annað gav hetta at bíta, tá teir í fyrru grannauppgerðini bukaðu neistamenninar bláar.

Hinvegin hevur Kyndil eisini vist sera óstøðugt spæl, og tá Neistin samstundis tykist vera í ferð við at reisa seg, so kann væl verða, at talan gerst um eina ógvuliga javna uppgerð.

Tað telur tó skeiva vegin hjá Neistanum, at teir helst mugu vera tveir av dyggastu stuðlunum fyriuttan. Damir Oros fekk reytt kort í dystinum móti H71 sunnudagin, so hann er í øllum førum ikki við. Hartil fekk Blagoje Buha vøddaskaða í sama dysti, so tað er mest sum óhugsandi, at hann verður førur fyri at spæla.

Undan mansdystinum verður talan um botndyst í bestu kvinnudeildini, tá Kyndil tekur ímóti Tjaldri. Bæði liðini hava seinastu vikurnar verið í eldinum fyri annað enn akkurát leikligu avrikini, men hesaferð kunnu tey so eftir øllum at døma savna tankarnar um tað, sum fyriferst á vøllinum.

Sunset kappingin
24.11 18.30 Kyndil – Tjaldur Hartvig Joensen & Pole Hansen

Atlantic Aiwrays kappingin
24.11 20.00 Kyndil-Neistin Hartvig Joensen & Pole Hansen